# Oljuprísir og Føroyar

**"What might a world of high oil prices mean for the Faroe Islands?" Tað er evnið, sum vártingið hjá Oljutinginum fer at viðgera**

OLJUTING
*tíðindaskriv*

Á Vártinginum hjá Oljutinginum fer Professor Paul Stevens frá Centre for Energy, Petroleum and Mineral Law and Policy, á Universitetinum í Dundee at halda fyrilestur undir heitinum, "What might a world of high oil prices mean for the Faroe Islands?".

Úti í heimi hava ymisk viðurskifti ført við sær, at oljuprísurin á heimsmarknaðinum er støðugt hækkaður, soleiðis at miðalprísurin higartil í ár hevur ligið omanfyri 45 dollarar fyri tunnuna, og fyri stuttum setti oljuprísurin met við at fara uppum 55 dollarar fyri tunnuna. Við tí høga oljuprísinum á heimsmarknaðinum er nevndin í Oljutinginum fegin um at hava fingið Professor Stevens at greiða frá hesum sera viðkomandi evni.

Føroya Kolvetni stuðlar Vártinginum, og kemur Nils Sørensen, stjóri, at greiða frá Føroya Kolvetni og teirra framtíðar ætlanum innan oljuvinnuna. Eisini stuðla Atlantic Airways og Hotel Hafnia tiltakinum.

Aftaná fyrilestrarnar verður høvi hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Vártingið verður mikukvøldið 30. mars 2005 kl. 19.00 í Listaskálanum.

### Seminar

Í sambandi við vitjanina, fer Professor Paul Stevens eisini saman við Fíggjarmálaráðnum at hava seminar fyri búskaparfrøðingum, sum starvast í føroysku aðalráðunum, stovnum og ráðum v.m. Evnið á tí seminarinum verður, "How much of the ‘resource curse’ debate is relevant for the Faroe Islands?". 'Resource Curse' vísir til búskaparliga ástøðið um at lond, ið eru rík í náttúrutilfeingi ofta ikki hava eins stóran búskaparvøkstur og onnur lond, ið ikki hava nógv náttúrutilfeingi. Viðgjørt verður í hvønn mun hetta ástøði er galdandi fyri Føroyar og búskaparligu menningina í Føroyum. Væntandi verður hetta eitt áhugavert tiltak hjá búskaparfrøðingum og øðrum, ið hava áhuga fyri búskaparligu avleiðingunum av einari møguligari oljuvinnu umframt samfelagsbúskaparligari menning sum heild. Høvið verður eisini hjá áhoyrarunum at seta spurningar, og vónar Professor Stevens at orðaskiftið verður gevandi.



*Í sambandi við vitjanina, fer Professor Paul Stevens eisini saman við Fíggjarmálaráðnum at hava seminar fyri búskaparfrøðingum*

## Felags summarfrítíð í byggivinnuni

Fleiri byggifyritøkur kring landið hava lýst við, at tær fara at hava felags summarfrítíð í ár. Hetta minnir ikki sørt um ídnaðarferiuna, sum er galdandi í fleiri europeiskum londum, og sum - hóast hon kann vera irriterandi - eisini lættir um í tilrættisleggingu av byggiarbeiði av ymsum slag.

Fyritøkurnar handan lýsingina, far allar at hava stongt í døgunum frá 25. juli til 13. august, og eru hesar: P/F Articon, P/F BSV, Sp/f Búsetur, P/F Elmek, Sp/f El&Tele, P/F Føroya Termovirki, Sp/f Haldur Vang, J & K Betong, P/F Løvubetong, P/F Zacharias Leitisstein, P/F Atlanticpane, P/F Byggitek, P/F Demich, P/F Einar Mikkelsen, P/F Føroya Gluggi, P/F Guttesen & Staksberg, Sp/f Hans Dam, P/F J & K Petersen og P/F Vatnsoyra Snikkaravirki

-jm

## Oljan ríkar Danmark

Hetta skrivar Føroya Sparikassi á heimasíðu sínari.

- Í fjør varð útflutningsvirðið hjá oljuni og heiliváginum heilar 33 mia.kr. Størsta orsøkin til, at oljan nú telist millum virðismestu útflutningsvørurnar, er, at prísurin á olju er nógv hækkaður seinastu mánaðirnar. Kortini verður ávarað ímóti at festa ov nógv álita á oljuinntøkur, skrivar Sparikassin.

- Man kann ikki rokna við inntøkunum frá olju, tí prísirnir eru ov óstøðugir, sigur Jens Brendstrup fra HTS, ið er høvuðsfelagsskapurin hjá vinnugreinunum handil, flutningur og tænasta.

-jm

## Framvegis punktgjald á ávísar hvítvørur

Landsstýrið hevur nú borið eitt uppskot í Løgtingið, har lagt verður upp til, at fleiri punktgjøld á el-lutum skulu strikast frá 1. apríl at rokna. Meiningin er, at inntøkurnar, ið landskassin missir við strikaðu punktgjøldunum á el-lutum, skulu koma inn aftur við avgjøldum á søtmeti.

Punktgjøldini hvørva tó ikki heilt, tí lógaruppskotið fevnir bert um ein kapittul í toll- og vøruskránni.

Tað merkir, at meðan punktgjaldið á eitt nú sjónvørpum og komfýrum verður strikað, so verður punktgjald framvegis á vaskimaskinur og turkitrumlur. Ein onnur avleiðing av nýggja lógaruppskotin-um er, at meðan punktgjaldið á perur hvørvir, so verður framvegis punktgjald á lampur.

*www.sparikassin.fo*

## Kina hólvar øll av

Samstundis, sum føroyska flakavinnan er í náðileysari kapping við kinversku flakavinnuna, eru eisini aðrar vinnur kroystar av bíligu framleiðsluni í Kina. Klæðnaframleiðarar í heimsins fólkaríkasta landi eru nevniliga í ferð við at vinna alla kappingina í klæðnavinnuni.

Dagens Næringsliv skrivar, at í kinverska býinum Datang verða níggju milliardir sokkar gjørdir hvørt ár. Tað merkir, at ein triðingur av heimsins sokkum koma úr Datang. Hvønn tíma fara eisini 35.000 nýggj slips úr framleiðsluhøllunum í býinum og til útflutnings.

Orsøkin til, at Kina tekur seg fram á hesum økinum júst nú, er, at á nýggjárinum vórðu klæðnakvoturnar hjá landinum burturbeindar. Úrslitið er, at mongdirnar av klæðum úr Kina eru stórliga øktar, og prísirnir eru nógv lækkaðir.

Bæði ES og USA umhugsa at seta í verk tiltøk fyri at avmarka kinverska klæðnaútflutningin til europeiska og amerikanska marknaðin. Sambært blaðnum Asian Wall Street Journal eru myndugleikarnir í Kina sinnaðir at tosa um, hvørji sjálvboðin tiltøk landið kann fremja til tess at sleppa undan umfatandi revsitiltøkum móti kinverska búskap-inum.

*www.sparikassin.fo*

## Enn ein rentuhækking

Í farnu viku var størsta hendingin nettopengastreymurin til USA. Marknaðurin hevði væntað, at nettopengastreymurin var kr. 58,5 mia., men rættiliga óvæntað vísti uppgerðin, at fluttar vórðu kr. 91,5 mia. til amerikanska búskapin í januar mánaði. Væntandi eiga tjóðbankarnir í fjareystri bróðurpartin av hesi upphædd. Sostatt kann sigast, at viðmerkingarnar frá tjóðbankunum í fjareystri um at skifta gjaldoyratiltaksgrunnar sínar úr USD til onnur gjaldoyru ikki er víst í verki - enn í hvussu er.

EU-londini hava á fundi seinasta vikuskifti slakað krøvini í stabilitetspaktini eitt sindur, og hava loyvt størri halli á fíggjarlógunum enn áður viðtikið. Hetta fekk mánadagin renturnar at hækkað nakað. Væntandi fer hetta tó bert at hava ein stuttan virkna.

Eisini hesa vikuna verður tað USA, sum avger hvat hendir við evropeisku rentunum. Væntandi hækkar amerikanski tjóðbankin rentuna enn einaferð við 0,25% í kvøld. Meiri áhugavert verður tó, hvussu tjóðbankin roknar við, at framtíðin sær út. Væntað verður, at rentan verður hækkað nakrar ferðir aftrat, soleiðis at hon verður minst 3,5% við árlok. Hetta velst tó um, hvussu brúkaraprísirnir broytast. Um framleiðarnir megna at flyta príshækingarnar til keyparan, vænta vit, at rentan veður hækkað við somu ferð sum nú. Meira fæst at vita um prísvøksturin í vikuni.

*www.foroyabanki.fo*